# Mentanarhúsið nýggjan leiðara



18. mai tekur 30 ára gamli Sámal Torstein Olsen við sum nýggjur leiðari í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Seinastu trý árini hevur Sámal Torstein Olsen starvast í Norðurlandahúsinum..Ein av fremstu uppgávunum hjá leiðaranum verður at menna og útbyggja tænasturnar í húsinum. Eisini uppgávur sum skipan og samskipan av tiltøkum fara at standa frammalaga. Sámal Torstein Olsen fer hartil at taka sær av samskiftinum hjá Mentanarhúsinum úteftir og at røkja og menna heimasíðuna og ymsar samskiftisprofilar. Almenn móttøka fyri nýggja leiðaranum verður leygardagin 23. mai kl. 14.00.

# Blaðstjóri burturvístur

Leiðslan á danska blaðnum Lokalavisen Valby hevur sagt blaðstjóran, Karsten Madsen, úr starvi og samstundis givið honum boð um at halda seg burturi frá blaðhúsinum. Um orsøkina sigur leiðslan, at blaðstjórin hevur í loyndum arbeitt við at stovna sítt egna blað í Valby, og at hann hevur roynt at fáa nøkur starvsfólk á blaðnum at koma við sær. Karsten Madsen hevur havt eina heldur fjakkandi tilveru í arbeiðslívinum. Eitt skifti arbeiddi hann á tíðindatænastuni hjá Sosial-demokratunum, eitt skifti sum politiskur blaðmaður á B.T., og eitt skifti var hann blaðstjóri á JydskeVestkysten. Hann hevur eisini verið upp á tal sum valevni hjá Vinstra.

# Eiga ikki at stúra

**Boðini frá føroyska pandemibólkinum eru greið. Føroyingar hava onga orsøk at stúra, men vit eiga at ansa okkum fyri líkasælu**

SVÍNAKRÍM
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Høgni Debes Joensen, landslækni og formaður í pandemibólkinum, sigur, at føroyingar ikki hava orsøk at stúra, men at vit heldur ikki eiga at vera líkasæl*

Mánadagin boðaði heimsheilsustovnurin WHO frá, at teir høvdu sett tilbúgvingarstigið upp á stig 3. Hetta eftir at útbrotið av H1N1-beinkríminum ella nýkrími í Meksiko var komið í ljósmálan.

Longu týsdagin komu boðini at teir høvdu sett tilbúgvingarstigið upp á 4, og mikukvøldið settu teir tilbúgvingina á stig 5, ið er tað seinasta tilbúgvingarstigið áðrenn ein heimsfarsótt ella pandemi er veruleiki.

Tá heimsheilsustovnurin boðar frá, at tilbúgvingarstigið verður sett upp, ávirkar tað eisini Føroyar.

Føroyar hava ein sokallaðan pandemibólk, ið verður kallaður saman, skuldi hóttanin um eina pandemi verðið veruleiki. Í hesum pandemibólki eru umboðaði ovasta serfrøðin í fyribyrging, heilsumyndugleikarnir, so sum landslæknin, landsapotekarin og yvirlæknar, og tilbúgvingin.

## Eru tiknir á bóli

Hóast tað ikki enn var neyðugt, kallaði landslæknin, sum er Høgni Debes Joensen, pandemibólkin inn til fund hósdagin (í gjár). Tá var tilbúgvingarstøðið á stig 3, og tí var tað bara fyri at binda um heilan fingur, at hann kallaði bólkin saman.

Men longu áðrenn fundurin var hildin, hevði WHO hækkað tilbúgvingarstigið tvær ferðir, og hetta hevur tikið ikki bert teir føroysku, men allar heimsins heilsumyndugleikar á bóli.

- Hetta hevur gingið óvanliga skjótt. Vanliga ganga tað vikur, mánaðir ella upp til ár millum at stigini verða hækkaði. Hesaferð hevur tað verið lítið meira enn eitt døgn ímillum, og tað er komið púra óvart á øll, segði landslæknin á tíðindafundi hjá pandemibólkinum í gjár.

## Eiga ikki at óttast

Pandemibólkurin hevði fund í allan gjár. Á fundinum varð aktuella støðan viðvíkjandi H1N1-beinkríminum viðgjørd gjølla og pand emitilbúgvingarætlanin, sum varð gjørd í 2006, gjøgnumgingin

Tá hesin fundur var av, kallaði pandemibólkurin inn til tíðindafund, og har vóru boðini sera greið.

- Vit hava enn onga sum helst orsøk til at vera bangin ella at stúra. Men hinvegin mugu vit heldur ikki vera líkasæl. Støðan er álvarslig, og tí eiga vit at ansa eitt sindur eftir. Men enn er eingin orsøk at vera bangin, sigur Høgni Debes Joensen, landslækni og formaður í Pandemibólkinum.

Høgni Debes Joensen, landslækni, sigur, at hóast tað higartil hevur gingið sera skjótt fram móti eini pandemi, væntar hann ikki at vit koma inn í fasu 6, ið er pandemifasan, innan vikur, men at vit heldur tosa um mánaðir, áðrenn tað er komið hartil.

## Pandemibólkurin:

Høgni Debes Joensen, landslækni (formaður)
Heri Mørkøre, landsapotekari
Sten Larsen, kommunulækni og umboð fyri Læknafelag Føroya
Jón á Steig, fyrrv. leiðandi yvirlækni á medisinska deplinum á Landssjúkrahúsinum
Rógvi F. Johansen, samskipari fyri tilbúgving í Føroyum, Fiskimálaráðið
Jón Klein Olsen, politiinspektørur og umboð fyri Føroya Landfúta
Tummas í Garði, varastjóri á Landssjúkrahúsinum
William Smith, smittuverjufrøðingur í Heilsuverkinum
Bjarni á Steig, settur leiðandi yvirlækni á Landssjúkrahúsinum
Jan Simonsen, ráðgevi og umboð fyri Heilsumálaráðið (skrivari)

# Stýrið í Atlantis lagt kongin

**Stýrið fyri Mentanarhúsið Atlantis heldur seg ikki kunna virka við skerdu játtanini til húsið, og hava stýrislimirnir tí sagt seg úr sessunum**

MENTAN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Í skrivi í gjár til borgarstjóran í Klaksvík, Gunvá við Keldu, kom stýrið fyri Mentaranhúsið Atlantis við soljóðandi fráboðan

„Undirritaðu stýrislimir fyri Grunnin Mentanarhúsið Atlantis hava í dag á fundi tikið avgerð um at siga okkum frá sum stýrislimir frá 1. mai 2009 at rokna.

Henda avgerð er tikin, eftir at býráðið á fundi hin 29. apríl 2009 gjørdi av at skerja játtanina til grunnin í inniverandi ári við kr. 100.000,-.

Stýrið hevur í samband við viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2009 gjørt vart við, at ikki bar til at skerja játtanina til Atlantis við meira enn kr. 50.000,-. Hetta bleiv eisini gjørt, tá játtanin fyri 2009 varð minkað við kr. 50.000,-.

Avgerðin hjá býráðnum, um nú aftur at minka játtanina við kr. 100.000,- í samband við endurskoðaðu fíggjarætlanina hjá Klaksvíkar Kommunu, hevur við sær, at stýrislimirnir staðfesta, at tað ikki er møguligt at hava ein framhaldandi rakstur av stovninum.

Tá Klaksvíkar Kommuna hevur eina aðra fatan av støðuni enn undirritaðu stýrislimir, so lata vit tað upp í hendurnar á kommununi sjálvari at gjøgnumføra sínar ætlanir.

Í stýrinum hava sitið Nikolina Olsen, forkvinna, Súsanna Olsen og Fróði Løkságarð, nevndarlimir.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá borgarstjóranum, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Hava ríkiligt av øllum

**Landsapotekarin staðfestir, at Føroy-ar eru væl og virðiliga útgjørd til at taka móti eini heimsfarsótt. – Vit hava ríkiligt av heilivági og útgerð til at verja okkum, og kunnu taka triðja hvønn føroying í viðgerð, sigur Heri Mørkøre, landsapotekari**

SVÍNAKRÍM
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*




*Føroyska goymslan av heilivági og verndarútgerð er væl útgjørd, og vit hava ríkiligt av heilivági til bæði fyribyrging og viðgerð*

Støðan við heilivági í Føroyum er sera góð. Tað staðfestir Heri Mørkøre, landsapotekari, enn eina ferð.

Í gjár kom fram, at danir hava gjørt av at bíleggja 40.000 dosur av heilivágnum Relenza, omaná teirra lagur av Tamiflu tablettum. Hetta til tess at binda um heilan fingur og hava eitt gott alternativ til Tamiflu.

- Hetta stigið tóku vit longu fyri trimum árum síðani, og umframt at vit hava eitt nógv størri depot av Tamiflu til hvønn íbúgva, hava vit eisini 5.000 Relenza píst-arar, sum hvør svarar til eina viðgerð. Umframt hetta, so hava vit eisini 25 kilo av Amantadin, sum kunnu nýtast til 26.000 viðgerðir, sigur Heri Mørkøre.

## Kunnu viðgera triðja hvønn føroying

Niðurstøðan av fundinum hjá Pandemibólkinum er, at sum heild er støðan góð í Føroyum, og um so er, at H1N1 verður staðfest, so eru myndugleikarnir tilbúnir.

- Í løtuni kunnu vit viðgera yvir 30 prosent av Føroya fólki, sum er meira enn fleiri av okkara grannalondum, og sum verður mett at verða ríkiligt í sambandi við eina pandemistøðu. Harumframt hava Føroyar í samstarvi við Statens Serum Institut, eins og Danmark, fingið koppsetingartrygd til umleið helmingin av føroyingum.

Eisini tá ið tað viðvíkur verndarútgerð, so sum maskur, kitlar og verndarbrillur, er nóg mikið til av útgerð til eina byrjandi pandemi.

Harumframt hevur landsapotekarin bílagt størri mongdir av verndarútgerð, sum kemur til landið fyrst í komandi viku.

Enn verður tó hvørki neyðugt við heilivági ella verndarútgerð, tá virusið ikki er staðfest í Føroyum, og eingin er settur undir eygleiðing fyri smittutekin.